# Leggja skúlar lamnar av berum treiskni

**– Tað er sera harmuligt, at Føroya Kommunufelag ikki vil gjalda tað, sum tað kostar at reka søvnini á skúlunum. Tað kostar einar 1o.000 krónur fyri smærru skúlarnar um árið, sigur Elsa Birgitta Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag**

SAVNSRØKT
*Eirikur Lindenskov*

Seinastu mánaðirnar hevur stríð valdað millum Føroya Lærarafelag og Føroya Kommunufelag um savnsrøktina á skúlum. Málið snýr seg um, at Føroya Lærarafelag heldur, at lærarar eiga at fáa løn fyri at keypa inn til og røkja søvnini á skúlunum, t. d. smíðstovur, evningstovur, alis-



*– Tað er ófatuligt, at Kommunufelagið soleiðis velur at leggja skúlarnar lamnar, tí hetta snýr seg ikki um nógvar pengar, sigur forkvinnan í Føroya Lærarafelag, Elsa Birgitta Petersen*

og evnafrøði, tónleik, fimleik o. s. fr.

Men hetta vil Føroya Kommunufelag ikki hoyra talan um.

Fyrr í ár var semja gjørd millum Kommunusamskipan Føroya og Føroya Lærarafelag um hesi viðurskifti. Í Kommunusamskipan Føroya eru tær størstu kommunurnar.

Sambært tí semjuni rinda land og kommunur hvør sína helvt av hesum kostnaði.

Hóast Kommunufelagið ikki vil góðtaka hesa semju, so hava ávísar kommunur kortini valt at gjalda tað, sum hetta kostar. Men nú um dagarnar var fundur í Føroya Kommunufelag, har breið semja var um, at kommunurnar ikki skulu gjalda.

– Tað er ófatuligt, at Kommunufelagið soleiðis velur at leggja skúlarnar lamnar, tí hetta snýr seg ikki um nógvar pengar, sigur forkvinnan í Føroya Lærarafelag, Elsa Birgitta Petersen. Hon sigur, at fyri smærru skúlarnar er talan um einar 10.000 krónur um árið.

– Eg veit um onkran skúla, har tað snýr seg um 1.000 krónur um árið, sigur hon.

– Við ikki at vilja gjalda pengarnar, so gera kommunurnar tað, at amboð á skúlunum forfella, og at undirvísingin verður nógv darvað og í summum førum steðgar upp, sigur forkvinna lærarafelagsins, sum heldur tað vera langt úti, at hetta bara skal verða grundað á treiskni.

– Skattgjaldarin í hesum kommununum rindar kortini fyri hetta á hinum skúlunum, tí landið rindar jú helvtina, og allir skattaborgarar í landinum rinda skatt til landið. Við framhaldandi at forða hesum, hevur Føroya Kommunufelag eisini sett seg upp ímóti, at skúlarnir í teirra limakommunum njóta gott av teirri avtalu, sum longu er gjørd um, at landið rindar helvtina av øllum hesum útreiðslum.

Elsa Birgitta Petersen ger greitt, at limir í Føroya Lærarafelag ikki vilja arbeiða uttan at fáa løn. Lærarafelagið hevur tó einki ímóti, at kommunurnar seta onnur fólk at taka sær av hesum uppgávum, men limir í lærarafelagnum gera tað so ikki, um ikki teir fáa løn.

Formaðurin í Føroya Kommunufelag, Jacob Vestergaard væntar, at semjan, sum gjørd er, bara er fyribils, og at hetta verður dýrari seinni. Men hesum vísir Elsa Birgitta Petersen aftur.

– Sum sagt so gera vit einki fyri einki. Vit hava fingið eina góða avtalu við Kommunusamskipan Føroya, sum staðfestir, at hetta er arbeiðið, sum gjaldast skal fyri. Vit hava ikki ætlanir um at krevja hægri løn fyri hetta, tó at hetta sjálvandi er ein sáttmálaspurningur, soleiðis er tað við øllum sáttmálum, sigur hon.

– Vit fegnast um at síggja, hvussu væl tað nú gongur á skúlunum í størru kommunum, og harmast samstundis um, at skil ikki kann fáast á øllum skúlum – sum sostatt liggja lamnir av berum treiskni, sigur Elsa Birgitta Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag.

# Kostar 121 kr fyri hvønn næming

**Ósemjan millum Føroya Lærarafelag og Føroya Kommunufelag merkist væl í skúlanum á Giljanesi. Kaos valdar í fleiri lærugreinum, og har tosa tey eisini um at lata 10. flokk sleppa at velja lærugreinir umaftur – og bara lata tey velja millum tær bókligur lærugreinirnar. Á Giljanesi kostar savnsrøktin 121 krónur fyri hvønn næming**

SAVNSRØKT
*Eirikur Lindenskov*



*– Verður hendan trætan ikki loyst sum skjótast, so er spurningurin um vit ikki skulu lata næmingarnar í 10. flokki velja umaftur – og tá bara geva teimum bókligar lærugreinir í at velja, sigur Hans Jørgensen, sum hevur boðað bæði Føroya Lærarafelag og Mentamálaráðnum frá teirri ótolandi støðuni*

– Okkara skúli er fullkomiliga lamin á fleiri økjum og skerdur á øðrum økjum, sigur Hans Jørgensen, stjóri á skúlanumá Giljanesi í Vágum.

Har hava tey verið merkt av hesi ósemju tann mánaðin, sum er farin av hesum skúlaárinum. Hans Jørgensen sigur, at trupulleikin ikki var so stórur fyri summarfrítíðina, tí tá hjálptust tey við tí, sum var keypt inn, og sum í summum førum varð keypt til alt skúlaárið.

Men nú hava tey stórar trupulleikar á Giljanesi.

– Smíðstovan kann ikki brúkast, og næmingarnir sleppa ikki at arbeiða. Lærararnir verða noyddir at finna upp á ráð – og fáa næmingarnar at gera eitthvørt, sum hevur okkurt við evnið at gera, sigur Hans Jørgensen.

í alis- og evnaførði klára tey seg kanska eina tíð afturat, tí har verður keypt inn soleiðis, at tað varar eitt sindur longur. Í lærugreinini handarbeiði er skilið tað sama sum í smíð, har er einki tilfar at arbeiða við, og tað sama er galdandi fyri evning, hvar valdar kaos, sigur skúlastjórin.

Hans Jørgensen vísir á, at t.d. 10. flokkur er eitt tilboð til næmingarnar. Skúlin á Giljanesi er ein litil skúli, og tað hevur frammanundan við sær, at lítið er at velja í, tí næmingagrundarlagið er so lítið.

– Verður hendan trætan ikki loyst sum skjótast, so er spurningurin um vit ikki skulu lata næmingarnar í 10. flokki velja umaftur – og tá bara geva teimum bókligar lærugreinir í at velja, sigur Hans Jørgensen, sum hevur boðað bæði Føroya Lærarafelag og Mentamálaráðnum frá teirri ótolandi støðuni.

Hans Jørgensen vil ikki taka støðu til, hvør av pørtunum hevur rætt og ikki.

– Men man kann ikki lata hetta ganga út yvir skúlan á henda hátt – serliga ikki tá vit eru so illa sperd frammanundan, staðfestir hann.

Skúlastjórin á Giljanesi vísir eisini á, at lærararnir eru í føstum starvi. Teir kunnu ikki sigast upp, hóast eingin undirvísing er í ávísum lærugreinum. Eisini er tað eitt krav til næmingarnar í 10. flokki, at teir skulu hava í minsta lagi 28 undirvísingartímar, so tað ber heldur ikki til at gera teimum frí.

Hans Jørgensen sigur við Sosialin, at hann herfyri fekk ábendingar um, at málið fór at verða loyst, og tí gjørdu tey ikki meira við málið. Men nú hevur hann fingið at vita, at støðan er fæst læst í Føroya Kommunufelag.

Fyri skúlan á Giljanesi er talan um 30.000 krónur um árið, sum tað kostar í kommununnar parti at rinda fyri savnsrøktina. Á skúlanum eru 248 næmingar, sum allir eru merktir av hesi ósemju, hóast eldru flokkarnir í størri mun merkja hetta.

Fyri hvønn næming er talan um 121 krónur…

# Adressan er skeiv

**Formaðurin i Føroya Kommunufelag skilir væl, at lærarar vilja hava løn fyri at røkja søvnini í skúlunum. Hann vísir kortini á, at tað er landið sum er arbeiðsgevari hjá lærarunum. Eiga kommunurnar at rinda fyri savnsrøktini, so er tað ein spurningur millum land og kommunur og ikki lærarafelag og kommunur, sigur hann**



*– Tað kann ikki verða rætt, at vit fáa rokningina, tí at Føroya Lærarafelag ikki fær Mentamálaráðið at bera allan kostnaðin av savnsrøktini, heldur Jacob Vestergaard*

SAVNSRØKT
*Eirikur Lindenskov*

– Tað er skeivt at býta lønarútreiðslurnar til lærarar millum land og kommunur.

Hetta sigur formaðurin í Føroya Kommunufelag, Jacob Vestergaard á Økrum.

Kommunufelagið hevur havt fund um trætuna við Føroya Lærarafelag, og har var breið semja um, at felagið ikki bakkar.

Jacob Vestergaard sigur, at man sjálvandi altíð kann tosa um, hvørt savnsrøktin er ein kommunal uppgáva ella ikki. Men um so er, so er tað eitt mál millum landið og kommunurnar, ikki millum kommunurnar og Føroya Lærarafelag.

– Tað kann ikki verða rætt, at vit fáa rokningina, tí at Føroya Lærarafelag ikki fær Mentamálaráðið at bera allan kostnaðin, sigur hann. Hetta heldur hann verða prinsippielt skeivt.

Formaðurin í Føroya Kommunufelag heldur hetta verða eitt keðiligt mál. Hann sigur, at kommunurnar hava allar góð viðurskifti við skúlan og við lærarar. Hann heldur tað tí verða sera keðiligt, at kommunur og lærarar á henda hátt verða sett hvør upp móti øðrum.

Jacob Vestergaard er væl greiður um, at hetta ikki er ein spurningur um pengar. Men ein spurningur um prinsipp. Hann væntar, at hetta bara er byrjanin, og at krøvini við tíðini fara at gerast hægri, um Kommunufelagið nú góðtekur henda leistin.

Men tað er ikki tí, at hann heldur, at lærarar fáa ovmikið í løn.

– Læraralønirnar eru alt ov lágar. Teir eiga at fáa væl meira í løn, og savnsrøktin eigur sjálvandi at verða ein partur av hesum, eins og t. d. KT-varaarbeiði er tað, sigur hann. Mentamálið rindar allar útreiðslurnar í sambandi við KT-vørarnar, tí heldur Jaocb Vestergaard, at sama prinsipp eigur at verða við savnsrøktini, heldur hann.

– Nú verður so nógv tosað um at fáa greitt býti millum land og kommunur. Fara vit nú at blanda tingini saman á henda hátt, so verður tað ein vavgreytur, sum vit ikki koma burtur úr aftur, sigur hann.

Jacob Vestergaard sigur, at hann skilir væl lærar-arnar og at teir eru loyalir yvir fyri Føroya Lærarafelag, ti tað skulu teir vera – og sjálvandi skulu teir hava løn fyri sítt arbeiði.

– Men adressan er skeiv, tá teir koma til kommunurnar eftir pengum, sigur hann.



# Framúr disco-ferð við Boney M

**Væl upplagda manningin í Boney M hevði fullkomiliga tak á áhoyrarunum í Fuglafirði leygarkvøldið, tá tey tóku fólk við aftur í árini, tá disco-tónleikurin hevði sína stórtíð. Tað var onga løtu keðiligt, tá tey spældu allar sínar kendu sangir**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*
*Myndir: Gissur Patursson*

Tað var disco-tónleikur fyri allar pengarnar, tá tey fýra fólkini í Boney M vóru á pallinum í Fuglafirði leygarkvøldið. Teir nógv kendu sangirnir úr sjeyti- og áttatiárunum ljómaðu ein fyri og annar eftir, og sangirnir riggaðu eins væl nú á døgum, sum teir plagdu at gera.

Tann lætta disco-rútman og tey góðu løgini fangaðu bæði tey ungu og tey, sum vóru ung í sjeytiárunum, og so var sannur harmoniur, hóast tvær gentur frammi við pallin máttu hjálpast burtur, tá tað gjørdist ov trongt.

Terji Rasmussen hevði fingið uppgávuna at hita áhoyrarnar upp, og hóast alt fólkið ikki var komið, tá Terji og hansara menn fóru at spæla, so var tað sum vanligt ein heilhjartaður innsatsur frá Terja. Hann hevur eisini nógvar kendar sangir at taka av, og tað gjørdi hann eisini sannførandi.

## Sungu væl

Stóra navnið hetta kvøldið var tó Boney M, og tey livdu eisini upp til alt tað, sum fólk væntaðu av teimum. Tað er bert ein av teimum upprunaligu limunum eftir í Boney M, men konseptið er tað sama – tríggjar myrkar songkvinnur og ein maður, sum hevur ein eitt sindur varligari leiklut.

Songkvinnurnar sungu sera væl, og tær dugdu eisini væl at upptraðka. Mazie Williams var við av fyrstan tíð, og hóast hon er farin um tey fimmti árini, so stóð hon einki aftanfyri tær nakað yngru kvinnurnar í bólkinum.

Tónleikurin var playback, og hóast tað ongantíð er nummar eitt, so riggar tað heilt væl til hetta slagið av tónleiki.

Ljóðið í Mentanarhúsinum í Fuglafirði verður sagt at vera frálíka gott, og tað er tað eisini. Ljóðmenninir høvdu ivaleyst loyst sína uppgávu til fulnar, men eisini ljóðumstøðurnar í salinum gjørdu, at tað ljóðaði framúr væl.

Umstøðurnar annars eru sera góðar, hóast húsið ikki er heilt liðugt enn, og tað átti at borið til at lokka nógv fólk úr Eysturoynni og úr høvuðsstaðnum til Fuglafirðar til líknandi tiltøk í framtíðini. Hesaferð eydnaðist tað at fáa fólk úr so at siga øllum landinum at leita til Fuglafjarðar.

## Einki nýtt

Boney M hevur nógvar góðar sangir at taka av, og tað vóru eisini bara kendir sangir, sum vóru á skránni leygarkvøldið. Tey royndu einki nýtt, og tað var heldur eingin, sum væntaði tað av teimum. Sáttmálin millum Boney M og áhoyrarnar, har tey vitja, er greiður: tey skulu spæla hittini.

Og tað gjørdi Boney M so, og tað varð væl móttikið – eisini av teimum, sum ikki vóru føðd, tá Boney M hevði sína stóru tíð.

Eitt spurnartekin kann setast við skránna til eitt slíkt tiltak. Tað er vani í Føroyum, at tað besta verður goymt til seinast, og tað verður seint eitt slíkt kvøld, tá tiltakið helst skal varða til klokkan 04 um náttina. Tá talan er um bólk, har stórur partur av teimum áhugaðu er komin nakað upp í árini, hevði tað kanska verið eitt hugskot at lagt høvuðsnavnið nakað fyrri á kvøldinum.

Men hóast onkur kundi ynskt sær hetta, so kundi tað ikki forða fyri, at konsertin eydnaðist sera væl, og Boney M tók øll við á eina ferð aftur í gyltu árini, tá disco-tónleikurin hevði takið á dansigólvunum kring heimin.







